# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale



## LANDSKAPPINGIN Í FÓTBÓLTI

Skírisdag byrjar fótbóltskappingin aftur til gleði fyri mong. Dystir verða bæði skírisdag og annan páskadag kring alt landið.

**VODAFONEDEILDIN**
Á fótbóltsvallum kring landið skírisdag og 2. páskadag




## 3D Í HAVNAR BIO

So er nýggjasta biograftøknin eisini komin til Føroya, og forsølan til fyrstu 3D filmarnar í Havnar Bio er byrjað. 08. apríl verða tveir filmar vístir í 3D. Annar er ein barnafilmur og hin er ein filmur fyri vaksin. Animatiónsfilmurin »Sådan træner du din drage« verður sýndur komandi hósdag kl 16 og 18.15, meðan filmurin »Clash of the Titans«, sum snýr seg um gudar og menniskju í gamla Grikkalandi, verður sýndur kl 20.30 og 22.45.

**3D FILMAR Í HAVNAR BIO**
Fyri fyrstu ferð í Føroyum hósdagin 8. apríl



## PIPAR OG SALT Á HÁLSI

2. páskadag og týsdagin 6. apríl verður Føroya klókasti maður, Esmar Eysturoy, giftur við síni Guðrun í Høllini á Hálsi. Hetta er eitt eftirhondini nógv umtalað brúdleyp, og tað er ein partur av stóra showinum hjá skemti-duo'ini, Pipar og Salt.

**PIPAR OG SALT**
5. og 6. Apríl í Høllini á Hálsi



## FØROYSKAR SENDINGAR Í SVF UM PÁSKIRNAR

Páskakvøld kl. 20.00 sendir svf eina sending um seinastu kolamenninir í Hvalba. Tað eru Zacharis Hammer og Bergljót D. Hentze, sum leggja sendingina til rættis. Annað páskakvøld kl. 20.00 verður seinasti filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir, »Sporini vaksa úr orðum«, sýndur. Filmurin snýr seg um Jóanes Nielsen.

**SVF**
páskakvøld kl. 20 og 2. páskakvøld kl 20



## ÚTGÁVUKONSERT

Høgni Reistrup, sum júst hevur latið eina nýggja fløgu úr hondum, hevur útgávukonsert á Hvonn. Konsertin verður skírisdag 1. apríl. Talan verður um eina einstaklingakonsert.

**ÚTGÁVUKONSERT**
á Hvonn skýrisdag

## RULLA PÁSKAREGG

2. páskadag er tað, at bæði stór og smá fara at royna okkara kreativu evni við at mála eggini. Síðani fáa vit dagsins dosis av frískari luft og rørslu við at fara út at rulla páskaregg, soleiðis, at vit við góðari samvitsku kunnu eta eggini av sjokolátu. Í Havn verður skipað fyri eggjarulling í Kúrdali. Farið verður frá Føroya Tele kl 14.30 og gingið verður gjøgnum Langadal oman til Kúrberg. Heitt verður á folk um at hava heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við.

**RULLA OG ETA PÁSKAREGG**
Hvar sum helst ella í Kúrdali





## FINALAN Í QUIZTINUM

Spurnarkappingin í útvarpinum nærkast nú endanum, og finalan verður leygarkvøldið 3. apríl. Tað verða Miðlahúsmenninir Heri Simonsen og Hilmar Jan Hansen, sum skulu kappast ímóti Niels Jensen og Finn Jensen.

**KRINGVARP FØROYA**
3. apríl kl 19

## DRAMASKEIÐ FYRI MENNINGARTARNAÐ

9., 10. og 11. apríl verður dramaskeið í Mentanarhúsinum. Tað eru Fuglafjarðar Sjónleikarafelag og Fuglafjarðar Kvøldskúli, sum hava tikið stig til eitt dramaskeið fyri menningartarnað og onnur.
Tað er sjónleikarin Egi Dam, sum hevur skeiðið, og Egi hevur eisini arbeitt sum stuðul.

**DRAMASKEIÐ Í FUGLAFIRÐI**
Mentanarhúsiði 9., 10. og 11. apríl